Ferðafólkini sviku

Í tíðarskeiðinum frá juli til november hevði kunningarstovan í Tromsø í Noregi 33.900 vitjandi. Tað var 3.000 ella næstan 10 prosent færri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Samstundis kæra gistingarhúsini í Tromsø seg um, at tey hava havt 5,1 prosent færri gestir enn í fjør. Hagtølini hjá norsku ferðavinnuni vísa annars, at í tíðarskeiðinum frá juli til november høvdu gistingarhúsini í Bergen 2,5 prosent færri gestir enn somu mánaðir í fjør, meðan gistingarhúsini í Trondheim høvdu 8,2 prosent fleiri gestir. Í Oslo var at kalla eingin broyting, skrivar NTB.

Putin krevur svar

Russiski forsætisráðharrin, Vladimir Putin, heldur, at Russland eigur at menna nýggj álopsvápn fyri at standa ímóti amerikonsku ætlanini um eina rakettverju. Á einari vitjan har eysturi í landinum segði Putin við tíðindastovuna Itar-Tass, at Russland eigur ikki at fáa sær eina rakettverju eins og amerikanararnir, men at russar heldur eiga at menna nýggj álopsvápn, tí tað er neyðugt fyri at varðveita javnvágina ímillum álop og verju. Fær amerikanska rakettverjuætlanin einki svar, kunnu amerikanararnir liva og láta, sum teimum lystir, segði russiski forsætisráðharrin sambært Itar-Tass.

2010 avgerandi fyri

Umframt at ENI fer at bora í vár, so er stóra avbjóðingin í 2010, hvørjar ætlanir Statoil hevur í eitt nú loyvi 008, sum gongur út í januar. Eygleiðarar gita, at møguleiki er fyri, at Statoil fer at átaka sær eina boring við markið kanska longu í 2011. Og tað kann fáa alstóran týdning fyri oljutilgongdina

OLJUÁRIÐ 2010

Analysa
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Skulu vit líta frameftir í føroysku oljutilgongdini, so eru tað serstakliga tvey feløg, sum vit bíta merki í. Tey eru italska oljufelagið ENI, sum fer at bora ein áhugaverdan brunn á Anne Marie leiðini tíðliga í vár. Keldur vilja vera við, at serfrøðingar meta tað vera 25% sannlíki fyri at finna olju.

Hitt felagið, sum kemur okkum til hugs, tá tosað verður um eina føroyska oljuframtíð er norska Statoil. Tað er ikki ov nógv sagt, at oljutilgongdin í Føroyum í løtuni liggur í hondunum hjá Statoil, tí felagið er fyristøðufelag fyri helvtina ella seks av teimum 12 loyvunum, sum eru á føroyska landgrunninum, og hesi loyvi fevna um eitt nógv størri øki enn hini loyvini tilsamans.

Sum 2009 hevur háttað sær innan oljuleiting í Føroyum, so kunnu vit siga, at í løtuni er alt avgerandi, hvørja avgerð tað eina felagið fer at taka komandi mánaðirnar. Og felagið er Statoil.

BP, Anadarko og Chevron út

Vit hava sæð í 2009, at bæði BP og Anadarko hava tikið seg úr Føroyaøkinum. Tað, sum kanska kom meira óvæntað, var, at eisini Chevron valdi at kasta hondklæðið fyribils í ringin og taka seg úr Føroyaøkinum. Størsta orsøkin sigst vera búskaparkreppan, og at felagið minkaði allar útreiðslurnar við 20%. Líka óvæntað var tað eisini, at Statoil átók sær leiklutin sum fyristøðufelag fyri Chevron í loyvi 008. Nú eru tað umframt Statoil, eisini DONG og OMV, sum eru í loyvi 008.

Tað verður sera áhugavert at fylgja við, hvat hesi feløg við Statoil á odda fara at gera við hetta loyvið. Vit vita, at avgerðin skal takast í januar mánað. Velja feløgini at lata loyvið innaftur, verður hetta eitt stórt bakkast fyri oljutilgongdina í Føroyum. Hinvegin, um feløgini átaka sær at bora ein brunn her, verður tað sera jaligt fyri oljutilgongdina í Føroyum.

Hetta loyvi liggur nevniliga heilt upp at Rosebank fundinum, sum liggur á bretskum øki heilt uppat tí føroyska markinum - bert 8 fjórðingar frá sjálvum markinum. Somu feløg, Statoil, DONG og OMV, eru við á tí økinum eisini. So átaka hesi feløg sær at bora ein brunn føroysku megin markið, kundi mangt bent á, at Rosebank-fundið spennir inn um markið í Føroyum. Bara tann tankin ella staðfestingin er í sær sjálvan sera áhugaverd fyri føroyska oljuleiting.

Møguleikin fyri at Rosebank gongur inn á føroyskt øki, ella at jarðfrøðiligu løgini báðumegin markið eru júst tey somu hevur verið frammi áður. Nú fáa vit so at síggja, um Statoil hevur hesa meting. Felagið er við í Rosebank og situr tí inni við nógvari vitan um alt økið.



Kærkomið

Fyri Føroyar sum heild hevði ein avgerð um at bora í 008 og so tætt upp at einum stórum fundi í bretskum øki verið sea kærkomið, ikki minst nú búskapargongdin ikki er heilt til vildar. At bora ein brunn í hesum økinum, er eisini ein sera stór íløga hjá feløgunum. Tað sigst, at ein brunnur, sum skal borast á hesi leiðini, kostar umleið eina hálva milliard krónur.

Og gera feløgini av at